

*Ein ørgrynnu av børnum tóku ímóti trøllunum leygardagin*

# Trølla Pætur á fimm málum

**Nú fara Trølla Pætur og omma hansara at tosa bæði danskt, íslendskt, svenskt og enskt. Framleiðararnir av filminum fara at gera eina roynd at marknaðarføra føroysku trøllini uttanlands**

FILMUR
*Eyðun Klakstein*

Í hesum døgum verða seinastu upptøkur gjørdar til nýggja filmin um Trølla Pætur og øru ommu hansara.

Talan er um fjórða filmin í røðini, og ætlanin er, at hann skal koma út síðst í november mánaði.

– Eg eri fullkomiliga sannførdur um, at hetta er nógv tann besti filmurin um Trølla Pætur, vit hava gjørt, sigur Niklas Heri Jákupsson, sum er ein av framleiðarunum av filminum.

– Vit hava ongantíð áður gjørt so nógv burtur úr leikritinum og upptøkunum. Her er meira action enn nakrantíð áður, og í stóru søguni eru nógvar smáar søgur.

Filmurin kostar okkurt um eina hálva millión at framleiða, og tað er felagið IRIS í Klaksvík, sum stendur fyri útgávuni.

**Sprongdu bil í luftina**

Í hesum fjórða filminum um Trølla Pætur kemur sisilianska mafian upp í leikin. Mafian sendir tveir av sínum bestu monnum til Føroya at stjala allar leikur og pengar, teir koma fram á.

Trølla-Omman, sum hevur verið nakað bundralig áður, hevur fyri fyrstu ferð fingið sær eitt veruligt arbeiði, men tá ið hon fer í bankan fyri at heinta løn fyrstu ferð, kemur eitt kuffert hjá henni í bland við tað hjá mafiuni, og so er galið.

Omman endar aftur í fongslinum, men hon vil reinsa seg sjálva, og tað verður byrjanin til eina jagstran eftir røttu brotsmonnunum bæði heima og úti. Nógv action er í filminum, og farna vikuskiftið sprongdi upptøkuliðið ein bil í luftina á Oyggjarvegnum.



*Erling politistur og politiovastin fegnast, tá ið teir koma aftur til Føroya eftir at hava jagstra leikamafiuna*

**Trølla Pætur á enskum**

Trølla Pætur hevur 9 høvd, og tað er líka við, at hann fær brúka fyri øllum hesum høvdum, nú hann skal tosa fleiri mál.

Nýggi filmurin verður týddur til danskt, svenskt, íslendskt og enskt, og tá ið hann kemur út á dvd fer tað at bera til at skifta ímillum málini.

– Vit gera hetta fyri at kunna marknaðarføra filmin uttanlands. Vit vilja ikki sita um nøkur ár og hugsa, at tað var spell, at vit ongantíð royndu at koma út um landoddarnar við trøllunum. Nú gera vit eina roynd, og so fáa vit at síggja, um nakar fer at býta á uttanlands, sigur Niklas Heri Jákupsson.

Seinastu upptøkurnar til filmin verða gjørdar hesa vikuna, og so byrjar endaliga klippingin av filminum.



# Skeinkja í gallarínum



*Fyrrverandi blómahandilin á Àarvegnum kann nú eisini hýsa sterkaru løgum av rúsdrekka lógliga.*
*Mynd: Maria Olsen*

**Mánadagin fekk Gallarí Jinx í Havn loyvi at skeinkja rúsdrekka. Eisini hevur gallaríið fingið eina bót áljóðandi 10.000 kr. fyri at skeinkja uttan loyvi á ólavsøku**

SKEINKILOYVI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Við eini bót fyri at skeinkja uttan skeinkiloyvi á ólavsøku á samvitskuni, kunnu kundarnir hjá Gallarí Jinx á Áarvegnum nú njóta rúsandi løgir.

Við postinum mánadagin til Gallarí Jinx var eitt skeinkiloyvi.

Formaðurin fyri loyvisnevndina, Eyðbjørn Larsen, váttar hetta fyri Sosialinum. Hann sigur, at loyvið er fyribils eitt ár.

- Sambært rúsdrekkalógini verða skeinkiloyvi givin fyri 4 ár í senn, men loyvi kann av Loyvisnevndini avmarkast og treytast.

At loyvið eftir umstøðunum er tíðaravmarkað merkir tí, at umsøkjarin til ta tíð má venda sær til Loyvisnevndina við dagførdum upplýsingum. Nevndin tekur síðani málið til viðgerðar aftur fyri at meta, um loyvið sambært lógini kann verða longt í trý áftrat, sigur Eyðbjørn Larsen.

Loyvið verður latið við heimild í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 - vanliga rópt rúsdrekkalógin.

**Sektaruppskot**

Á ólavsøku, stutt eftir at Gallarí var latið upp, møtti løgreglan upp í fyrrverandi blómahandlinum. Orsøkin var, at rúsdrekka, sum krevur skeinkiloyvi fyri at selja, varð selt og skonkt fyri gestum. Hetta vakti ans í fjølmiðlunum, og málið varð viðgjørt sum politimál, og øll søla av rúsdrekka hjá Gallarí Jinx steðgaði alt fyri eitt.

Hetta málið endaði við, at Gallarí Jinx tók við einum sektaruppskoti frá fútanum. Hendan bótin gjørdist 10.000 krónur.

Eyðbjørn Larsen sigur, at loyvisnevndin hevur havt hetta málið við í viðgerðini av umsóknini um skeinkiloyvi hjá Gallarí Jinx, men hildið verður ikki at talan er um eina nóg góða orsøk til at nokta loyvið, men heldur at geva eitt fyribils loyvi.

Hóast drúgvar royndir, fingu vit ikki orðið á eigarin og leiðarin fyri Gallarí Jinx, Florentze á Skipagøtu.

